ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 10. mars 2010

# Størsta avbjóðingin

**– At vinnarin í okkara bólki sleppur at spæla finalu í Keypmannahavn, samstundis sum EM-endaspælið er har, man vera størsta avbjóðingin, føroyskir spælarar kunnu fáa júst nú, heldur landsliðsvenjarin hjá hondbóltskvinnunum, Claus Rasmussen**




Hilmar Jan Hansen




Venjarin hjá kvinnulandsliðnum í hondbólti, Claus Rasmussen, leggur í hesum døgum síðstu hond á fyrireikingarnar til Challenge Trophy-kappingina í Estlandi fyrst í næsta mánaði

Mynd: Álvur Haraldsen

Fyrst í næsta mánaði fer kvinnulandsliðið í hondbólti til Tallin í Estlandi, har liðið skal spæla tríggjar dystir í Challenge Trophy-kappingini. Fyrsti dysturin er fríggjakvøldið 2. apríl ímóti vertstjóðini, Estlandi, og síðani verður spælt leygardagin 3. apríl ímóti Finnlandi og sunnumorgunin 4. apríl ímóti Moldova.

Fyrireikingarnar hava verið í gongd í eina tíð, og ein liður í tí var vitjanin av danska U18-landsliðnum í februar, sum vann heili 32-20 á føroyska liðnum. Harumframt eru regluligar venjingar alla tíðina, og nú fríggjakvøldið skulu hondbóltskvinnurnar aftur venja í Kollafirði.

– Vit venja hart og royna at fáa tað síðsta upp á pláss, so vit kunnu hava góða verju, góða kontrafasu og gott álopsspæl, tá vit fara til Estlands. Samstarvið og samspælið millum spælararnar á vøllinum hevur sera nógv at siga, so tað leggja vit stóran dent á nú. Kropsliga venjingarstøðan skuldi verið nøkulunda í ordan hjá spælarunum nú, sigur Claus Rasmussen, landsliðsvenjari.

Av mótstøðuliðunum er Finnland tað, hann kennir mest til – millum annað, tí Føroyar fyrr hava spælt ímóti finska liðnum. Júst hesin dysturin, ið tann mittasti av teimum trimum, kann sambært venjaran gerast lykladysturin í bólkinum.

– Eg havi fingið lyfti um, at eg skal fáa ein dvd við finska liðnum, so vit kunnu kenna tað uppaftur betur, sigur Claus Rasmussen, ið heldur hesa Challenge Trophy-kappingina vera eina serliga stóra avbjóðing hjá landsliðnum og spælarunum.

– At vinnarin í okkara bólki sleppur at spæla finalu í Keypmannahavn ímóti vinnaranum í hinum bólkinum, samstundis sum EM-endaspælið er har, man vera størsta avbjóðingin, føroyskir spælarar kunnu fáa júst nú. Tað hevði verið fantastiskt fyri bæði kvinnurnar og føroyskan hondbólt.

Í hinum bólkinum eru Ísrael, Kypros, Armenia og Malta, og tann bólkurin verður avgreiddur í Ísrael um eina góða viku, frá 19. til 21. mars.

# Stórsteypadysturin byrjar árið

**Seinnapartin sunnudagin verður fótbóltsárið av álvara skotið í gongd, tá føroyameistararnir í HB og steypavinnararnir í Víkingi hittast í Gundadali til ársins Stórsteypadyst, ið samstundis er til frama fyri vælgerandi endamál**

Hetta er fjórða árið á rað, at Lions Club í Føroyum saman við Fótbóltssambandi Føroya skipar fyri Stórsteypadysti millum føroyameistararnar og steypavinnararnar frá árinum fyri.

Dysturin, sum verður spældur á ovara vølli í Gundadali sunnudagin klokkan 15, verður millum HB, sum er føroyameistari, og Víking, sum er steypavinnari, og vinnarin sunnudagin fær stóra Lions-steypið í varðveitslu komandi árið.

HB hevur havt steypið hetta síðsta árið, tí liðið í fjør vann 3-1 á EB/Streymi, sum eisini var við í 2008, tá tað tó gjørdist til eitt 0-4 tap fyri NSÍ. Í fyrsta stórsteypadystinum, sum var í 2007, vann B36 á HB eftir brotssparkskapping, sum mátti til, tí tað eftir teir 90 minuttirnar stóð á jøvnum 1-1.

## Til gott endamál

Sum vanligt, fer ágóðin frá dystinum til vælgerandi endamál, og hesa ferð hevur Lions Club gjørt av, at pengarnir skulu fara til felagsskapin KRIS, sum veitir teimum hjálp og vegleiðing, sum hava verið fyri kynsligum ágangi.

Undanfarnu árini er ágóðin frá Stórsteypadystinum farin til verkætlanina »Tú hevur rætt« hjá Barnabata, Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn og ungdómsdeildina hjá Føroya Barnaheimi.

Atgongumerkjaprísurin er tann vanligi, 70 krónur, men fólk eru vælkomin at lata meira, um tey hava hug at stuðla endamálinum. Í hálvleikinum og eftir dystin er møguleiki fyri at fáa ein kaffimunn í FSF-húsinum.

Fyrireikingarnar av Stórsteypadystinum eru býttar soleiðis, at Fótbóltssamband Føroya tekur sær av tí fótbóltsliga, og Lions Club í Føroyum skipar so fyri øllum hinum, sum er rundan um dystin.

**hil**



HB, sum vann Stórsteypadystin í fjør, er aftur í ár í finaluni, sum hesa ferð verður ímóti Víkingi

Mynd: Sofus D. Johannesen